ANTARES
-vit sum starvast uttanlands

Hoyringsskriv frá Áhugafelagnum Antares til skattaumleggingina.

Avtøka av §25b

Antares vil staðiliga mæla frá at §25b verður avtikin!

Tað er sera umráðandi at sjófólk, ið ikke koma undir FAS ella DIS serskattaksipanina, varveita henda frádrátt. Øll heimsins lond, ið hava sjófólk, hava eina serskattaskipan fyri sjófólk. Hetta er grunda á at sjófólk eru í altjóða kapping. FAS skipani var júst innførd fyri at hava møguleika fyri at føroysk sjófólk kundu sigla undir Føroyskum flaggi. Trupuleikin er tó at tað eru ov fá størv í FAS skipanini til tey uml 1000 sjófólkini sum sigla uttanfyri FAS. Tí er neyðugt at tryggja at hesi sjófólk framvegis hava møguleika at røkja sítt starv.

Sum víst á í skrivi frá Deloitte, er talið av fólki sum arbeiðir uttanlands tað sama nú sum í 2013. Hetta vísur at skipanin við 25b virkar, og tá nógv arbeiði er í Føroyum er fleiri sum velja at arbeiða í Føroyum. At avtaka 25b fyri tey sum arbeiða á landi skilja vit, men havast skal í huga at tað ikki er møguligt at sløkkja og tendara fyri arbeiðismegi uttanlands sum tað passa við Føroyska búskapin. Møguleikin fyri at sjófólk og onnur hava haft møguleika at arbeiða uttanlands hevur verði við til at tálma tær afturgongur sum hava verði í búskapinum í gjøgnum tíðirnar.

Tað er av allar størsta týdningi at sjófólk varveita §25b frádráttin, tí tey ikki hava sama møguleika fyri at koma til Føroyar at arbeiða, ein og tey sum arbeiða á landi uttanlands.

Avtøka av 154b

So leingið sum Heilsutrygd arbeiðir við at royna málið í Hægsta Rætti kann 154b ikki avtakast. Tað er neyðugt at landstýrið setur seg saman og tekur ein avgerð um at máli er enda við dóminum í Eystara Landsrætti ella um málið skal roynast í Hægsta Rætti.

Um landstýrið velur at taka dómin hjá Eystara Landsrætt til eftirtektar, og hervið góðtekur at tey sum eru fevnd av Nordisk Konvention om Sosial Sikring, einans skulu gjalda í arbeiðslandinum, er onki sum forðar fyri at 154b verður avtikin. FMR og HMR eru noydd at vera samd um hvat skal henda í málinum.

Víst verður eisini til skjal ”Framløga”

ANTARES
-vit sum starvast uttanlands

Avtøka av samdøgursfrádráttinum.

Antares mælir til at skipanin við samdøgursfrádrátti verður varveitt, men í broyttum líkið. Samdøgursfrádrátturin skal einans vera fyri tey sum kunnu skjalprógva útreiðslur sum samdøgursfrádrátturin er ætlaður til. Hetta er serliga sjálvstøgu vinnurekandi ella tey hvørs arbeiðsgevari ikki vil gjalda t.d. ferðaseðil úr Føroyum til Danmarkar. Vit vita um onkrar limir hvørs arbeiðsgevari einans vil gjalda fyri teirra ferð í Danmark tí teir bara sigla í Danmark. Uppskotið eigur at vera broytt til, at einans tey, ið kunnu skjalprógva útreiðslur tey sjálvi hava goldið, i samband við teirra arbeiði uttanlands, hava rætt til samdøgursfrádrátt. Á henda hátt vil frádrátturin aftur vera sum hann upprunaliga var ætlaður.

Niðurlaging av sjómannafrádráttinum.

Antares metur at sjómannafrádrátturin eigur at vera sum hann er. Hetta grunda á at onnur lond, ið vit dáma at samanbera okkum við, hava somu ella hægri frádráttir til fiskimenn. Í Danmark er frádrátturin smáar 70.000 kr, og í Noregi er ætlanin at hækka frádráttin uppí 150.000 NOK. Føroyar hava eisini fingið við í Tvískattaavtaluna millum norðurlond Grein 15.4b at inntøka fyri fiskarí einans kann skattast í bústaðarlandinum. Hetta er serstakt tí allar inntøkur vanliga vera skattaðar í arbeiðslandinum. Um fiskimenn uttanlands velja at finna aðrar vinnuvegir eru stórar skattainntøkur sum fella burtur.
Eitt sum eisini er vert at hugsa um er at fleiri av hesum fiskimonnum (m/k) fóru ungir til skips og hava tí ikki tikið nakra útbúgving. Hesin hava set føtur undir egið borð og fingið maka og børn. Hetta húski kann koma í fíggjarligar trupuleikar um inntøkan minkar nógv og hesin onga útbúgving hava at fella aftur á.